# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Dirvi og áræði á Føroya Tele

Tað gerst øllum meira og meira greitt, at føroyingar í vaksandi mun skulu liva av vitanarframleiðslu. Henda gongd, sum vit bert í avísan mun eru harrar yvir, stendst av altjóðagerðini og kappingini frá láglønarlondum. Til tess at fóta sær í hesum sterka og óvendandi ráki er neyðugt, at nakrar grundleggjandi fortreytir eru til staðar og í lagi. Hetta merkir eitt nú, at skúli og útbúgving eiga at vera høgt raðfest, og hetta merkir, at samskiftis- og KT tøkni til eina og hvørja tíð er millum fremstu í heiminum.

Í hesum høpi er breiðbandsambandið við útheimin av altavgerandi týdningi. Hetta samband og tøknin í hesum høpi skulu hava bestu dygd, sum er atkomulig. Besta breiðbandstøkni- og óavmarkað orka er ein óvikilig fortreyt fyri menning og vøkstri í dagsins og ikki minst morgindagsins samfelag. Vinna, stovnar, skúlar, lærustovnar, fjølmiðlar – alt er heft at hesi tøkni og hesum hentleikum. Hetta rák fer at gerast alt sterkari, sum frá líður.

Tað er tí í tøkum tíma at Føroya Tele hevur tikið avgerð um at gera íløgu i ein nýggjan sjókaðal millum Føroyar, Hetland, Orknoyggjar og Skotland. Við hesum fer Føroya Tele at kunna tryggja brúkarunum teir góðu og tryggu samskiftismøguleikar, sum eru fortreytin fyri, at føroyska samfelagið framvegis skal kunna standa seg í kappingini og støðugt mennast og hava ein sunnan búskaparligan vøkstur. Við nýggja kaðalinum verður tørvurin nøktaður nógv ár fram og hervið fær vinnan ta trygd, sum er neyðug til tess at kunna gera neyðturviligar íløgur og gera menningarstrategiir. Føroya Tele hevur valt ikki at bíða eftir íslendingum, men at vera einsamalt um átakið og íløguna. Tað bar heilt einfalt ikki til at bíða eftir íslendingum. Hetta er púra beint og boðar frá dirvi og áræði. Átakið er neyðugt til tess at hava back up og tryggja brúkarunum eitt trygt samskiftissamband við tí orku, sum krevst. Samantikið eitt átak, ið er øllum samfelagunm til mikið gagn.

**Sosialurin**

## Bygdanøvn

### Bøurin, Dalurin, Sandurin, Vágurin?!? Argjum, Strondum,Toftum?!?

**EYÐUN Á BORG**



Bygdanøvn verða søgd og skrivað óbundin (Bøur, Dalur o.s.fr.).

Í talumáli kunnu vit siga Havnin (bundið), men vit skriva Tórshavn (óbundið) á einum skelti.

Vit kunnu neyvan taka eina bygd burturúr og lata hana vera bundna. Tí skriva vit Hellur, sjálvt um vit kanska siga Hellurnar í talumáli.

Vit siga/skriva heldur ikki: Hon býr í Bønum, á Sandinum, men í Bø, á Sandi o.s.fr.

Bygdanøvn verða sjálvandi skrivað í hvørfalli á einum skelti, ikki hvørjumfalli: Argir, ikki Argjum, Strendur, ikki Strondum o.s.fr.

Bygdirnar mugu tí eita: Skáli, Lambi (í hvørfalli). Hvør er har? Ein skáli, ein lambi!

Hvat kallkynsorðið, ein lambi, merkir, kunnu tey, sum eita í Lambanum, kanska greiða okkum frá!?

Við bygdarkvøðu

## Miðfyrisitingin krevur bygnaðarbroyting

**HEÐIN D. POULSEN**
løgfr.



Øll framkomin lond hava fyri neyðini at hava eina sterka umsiting at ráðgeva teirra stjórnum. Tað er sjálvandi ymiskt, hvussu lond velja at skipa sína umsiting, men í Føroyum hava vit í fleiri ár havt eina skipan, ið ikki er gjørd til tað føroyska samfelagið, men er meira ella minni ein eftirgerð av teirri donsku skipanini. Fleiri hava gjørt vart við sítt ónøgdsemi og hava funnist at tí føroyska embætisverkinum. Fyri stuttum førdi BLF, felagið hjá búskapar- og løgfrøðingunum, fram, at tørvur er á búskapar- og løgfrøðingum í miðfyrisitingini. Tað kann gott vera, at tað er tørvur á fleiri fólki í miðfyrisitingini, men man høvuðstrupulleikin ikki verða sjálvur bygnaðurin? Sum nú er, sita búskapar- og løgfrøðingar spjaddir út um tey 8 ráðini og ofta sita teir einsamallir við stórum uppgávum.

**Samla løgfrøðingarnar í ein stovn**

Rættast hevði verið at endurskoðað bygnaðin og funnið útav, hvussu vit skipaðu eina miðfyrisiting, ið er egnað til føroysk viðurskifti. Tað er nærliggjandi at hugsa, at ein bygnaður átti at verið skipaður soleiðis, at starvsbólkar, so sum løgfrøðingar, koma at arbeiða tættari saman og harvið kunnu nýta gott av vitan og royndum hjá hvørjum øðrum. Eitt hugskot hevði verið at samlað allar løgfrøðingarnar hjá miðfyrisitingini í ein stovn, sum síðani "seldi" sína tænastu til ráðini. Á hvørjum ári høvdu tey ymisku ráðini havt samráðingar við stovnin og sínamillum avtalað, hvussu nógvar tímar hvørt ráð hevði rætt at brúka fyri árið. Uppgávan hjá løgmanni og landsstýrinum hevði verið at raðfest nær tær ymisku uppgávurnar skuldu loysast.

Við at savna allar løgfrøðingar í ein stovn, hevði góðskan á arbeiðinum blivið betri og tað hevði eisini verið meira spennandi og mennandi at starvast í miðfyrisitingini. Allar løgfrøðisligar uppgávur hjá miðfyrisitingini høvdu verið loystar á einum stovni sum felagsuppgávur, har allir vanligir stórrakstrar fyrimunir høvdu kunnað verið gagnnýttir. Henda loysnin hevði ongan meirkostnað havt við sær.

**Einki er gjørt**

Tað eru politikararnir við løgmanni á odda, sum avgera, hvussu miðfyrisitingin skal skipast, men tað letur ikki til, at nakar tímir at geva hesum ans. Tað einasta, ið verandi politikarar við løgmanni á odda hava torað higartil, var at fremja ein fullkomuligan meiningsleysan niðurskurð av starvsfólki beint eftir seinasta val fyri síðani at hava mangla fólk líka síðani tá. Talið av aðalráðum hava teir tó hildið verið vert at klandrast um.

Fimm løgfrøðingar meira ella minni í miðfyrisitingin hvørki koppar nøkrum landi ella ger tað til tað besta í verðini. Skal góðskan í miðfyrisitingin mennast og skulu fólk trívast, so skulu bygnaðar broytingar til. Spurningurin er so bara, hvat løgmaður fer at gera við tað, ella um hann eisini fer at goyma hendan trupulleikan til vit í 2015 gerast verðins besta land.

Loysnin er ikki bert at hækka ella lækka talið av løgfrøðingum ella bara gera tað sum danskarar gera. Loysnin er at gera eina skipan til føroysk viðurskifti.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.
Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Bjarta Joensen bjarta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Heini Kristiansen heinik@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.